# Oljuráðstevna í Norðurlandahúsinum

**Eftirmeting av 1. útbjóðing og framtíðin**

Týsdagin 27. november og mikudagin 28. november skipar Oljuvinnufelagið við stuðli frá Oljumálastýrinum og FOIB fyri oljuráðstevnu í Norðurlandahúsinum. Fyrsta ráðstevnan av sínum slag var fyri einum ári síðani. Hesaferð er evnið ein eftirmeting av 1. útbjóðing – av úrslitunum av teimum fyrstu boringunum undir Føroyum. Har verður so bæði sett fokus á vinnuna, oljufeløgini og Oljumálastýrið og føroyskar myndugleikar. Eisini verður nomið við samfelagsligu avleiðingarnar av eini oljuvinnu.

Eins og í fjør fer Sosialurin at geva út eina serstaka útgávu til ráðstevnuna. Har fara vit at viðgera ráðstevnuna og teir spurningar hon fer at umrøða – í samrøðum, greinum, viðmerkingum o.l.

Einstaklingar, fyritøkur, stovnar og feløg, við tilknýti til eina komandi oljuvinnu, eru vælkomin at brúka hetta góða høvið til at gera vart við seg í serblaðnum. Tað veri seg gjøgnum kunningarskriv, lýsingar o.l.











Fyllið út seðilin og sendið hann til okkara. Sosialurin rindar postgjaldið. Seinasta freist at lata okkum tilfar, kunningarskriv og lýsingar til blaðið er 16. november.

Undirritaði, felag e.l. ynskir at fáa fleiri upplýsingar um serblaðið. Tað veri seg um kunningarskriv, lýsingar e.l.

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
#4

Avsendari:

Navn á fyritøku ____________________
Adressa ____________________
Kontaktpers. ____________________
Teldupostur ____________________
Telefon ____________________

Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76 110 Tórshavn



# DEILDARLEIÐARASTØRV Á JARÐFRØÐISAVNINUM

**Deildarleiðarastørvini á Dátudeildini og á Kunningardeildini á Jarðfrøðisavninum eru leys at seta frá 1. januar 2002.**

## Dátustjóri:

*Arbeiðsøki*
Høvuðsuppgávurnar og ábyrgdarøkini á Dátudeildini fevna um eitt nú:

- At skipa fyri og umsita tað nationala jarðfrøðiliga arkivið, herundir
  - goymsluna av øllum jarðfrøðiligum dátum, lutum og kanningartilfari annars á Jarðfrøðisavninum.
  - í samráð við oljufeløg o.o. at finna fram til og stíla fyri haldgóðum goymsluskipanum fyri allar jarðfrøðiligar elektroniskar seismikk- og boridátur v.m. við tilknýti til oljuleitingarvirksemið á føroyska økinum.
  - evna til neyðugar reglur og kunngerðir v.m.
- At leggja til rættis KT politikkin á Jarðfrøðisavninum og Oljumálastýrinum.
- At skipa og umsita allar edv-funktiónir á Jarðfrøðisavninum og Oljumálastýrinum
- Kortviðgerð

*Krøv til umsøkjaran*
Umsøkjarar mugu hava hóskandi útbúgving frá hægri lærustovni, umframt góðar leiðslu- og samstarvseginleikar. Fyrimun hava umsøkjarar við hollum royndum innan dátufyrisiting og kunningartøkni og innan jarðfrøðiligt arkivarbeiði sum heild.

## Kunningarstjóri:

*Arbeiðsøki*
Høvuðsuppgávurnar og ábyrgdarøkini á Kunningardeildini fevna um eitt nú:

- At skipa fyri jarðfrøðiligu framsýningunum á Føroya Náttúrugripasavni
- Í samráð við Náttúruvísindadeildina at skipa fyri jarðfrøðiligu undirvísingini fyri stovnin á Fróðskaparsetri Føroya
- At reka bókasavnið á Jarðfrøðisavninum og Oljumálastýrinum
- At skipa fyri og umsita almenna og fakliga kunningararbeiðið á stovninum, herundir heimasíðu og ársfrágreiðing v.m.

Roknað verður við, at kunningarstjórin somuleiðis eftir tørvi átekur sær vísindaligar uppgávur á stovninum.

*Krøv til umsøkjaran*
Umsøkjarar mugu hava hóskandi akademiska útbúgving í jarðfrøði ella øðrum viðkomandi fakøki, umframt góðar leiðslu- og samstarvseginleikar. Fyrimun hava umsøkjarar við hollum royndum innan undirvísingar-, savns- og kunningaryrkið og innliti í føroysku jarðfrøðini.

*Setanarviðurskifti*
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfeløg.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til stjóran á Jarðfrøðisavninum, tlf. 357000, fax 357001, t-brævmartinh@jfs.fo

Umsóknir við hjáløgdum CV, avriti av embætisprógvi, frágreiðing um arbeiðsroyndir v.m., skulu vera Jarðfrøðisavninum í hendi í seinasta lagi 22. november 2001. Adressan er: Jarðfrøðisavnið, Brekkutún 1, Postsmoga 3169, 110 Tórshavn.

Jarðfrøðisavnið er vísindaligur kanningarstovnur undir Oljumálastýrinum og virkar í kolvetnisumsitingini somuleiðis sum skipaður partur av stýrinum við ábyrgd fyri øllum jarðfrøðiligum viðurskiftum. Jarðfrøðisavnið hevur til endamáls at savna, varðveita, handfara og breiða út kunnleika um viðurskifti av týdningi fyri gagnnýtslu og varðveitslu av landsins jarðfrøðiligu náttúruvirðum. Stovnurin skal virka fyri, at lóggáva og umsiting av jarðfrøðiligum náttúruvirðum verður grundað á framkomna og dagførda jarðfrøðiliga vitan.

# B36 Shell Cup 2001

B36 bjóðar øllum dreingjum og gentum at gera lið til innandurakapping í fótbólti í høllini á Hálsi í døgunum 16. - 17. november 2001.
Aldursbólkarnir eru hesir:

| Nr. | Aldursbólkur | Føðiár |
|---|---|---|
| 1. | Pinkur | 1992-1993 |
| 2. | Gentur 10-12 | 1990-1991 |
| 3. | Smágentur 12-14 | 1988-1989 |
| 4. | Gentur | 1985-1987 |
| 5. | Pinkulingar | 1994-1995 |
| 6. | Smápiltar | 1992-1993 |
| 7. | Piltar | 1990-1991 |
| 8. | Smádreingir | 1988-1989 |
| 9. | Dreingir | 1986-1987 |
| 10. | Unglingar | 1983-1985 |

Spælt verður við stórum málum og málmanni.
Á hvørjum liði eru 5 leikarar (málmaður íroknaður).
Loyvt er at hava ein skiftileikara.
Liðini skulu hava fótbóltsnøvn
(Juventus, Rosenborg, B36 osfr.).
Luttøkugjaldið er kr. 200,- fyri hvørt liðið.
Føroya SHELL, ið stuðlar kappingini,
letur heiðursmerki til trý tey fremstu liðini
í hvørjum aldursbólki.
Seinasta freist at boða frá luttøku er
týsdagin 13. november 2001.
Tilmeldingin fer fram hjá umboðsmonnunum við
hesar skúlar, ella við at ringja:

| Skúli | Umboð | Tel |
|---|---|---|
| Tórsh. Kommunsk. | Jacob Thomsen | 31 62 29 |
| Venjingarskúlin | Tórður Hentze (9b) | 31 61 79 |
| Eysturskúlin | Jónas Næs (9a) | 31 42 40 |
| Hoyvíkar skúli | Rúnar í L. Jacobsen (6d) | 31 80 15 |
| Santa Frans skúli | Carl H. Olsen (7a) | 31 78 62 |
| Argja skúli | Petur Mortensen (9a) | 31 04 10 |

Shell

JUNIOR
BUSS TAXA
KOYRING
pláss til 10 ferðandi
Tlf. 22 33 11
Eyðbjartur Danielsen
Pætursgøta 14 • FO-188 Hoyvík • Tórshavn

## Skattalistin

Skattalistin fyri Hvalvíkar kommunu fyri árið 2000 liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá 7. november til 21. november 2001.

Kommunuskrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.00 til 13.00.

**Hvalvíkar kommuna**

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg

## Til allar heilsatstøðarar, sum eru limir í Almanna- og Heilsrøktarafelagnum

Pallbroðsfundur verður á Hotel Hafnia mánadagin 12/11 kl. 15.30

**Við á fundinum verða:**
Marin Vang, røktarleiðari, Landssjúkrahúsið.
Elspa Lútzen, leiðari, Ellis- og røktarheimið, Klaksvík.

Vinarliga
**Almanna- og Heilsurøktarafelagið**